

# Føroyingar aftur vitjan av børnum úr Ukraina

*Í summar fáa føroyingar vitjan av 12 børnum og 2 tolkum úr geiðslarakta Ukraina og skulu tey verða her í uml. 1 mánaða, hetta er triðju ferð at føroyingar taka ímóti børnunum úr Ukraina*

Í hesum sambandi og til arbeiði hjá Skandinavisku Barnamissiónini í Ukraina, eru bússir settar upp runt um í Føroyum.

2. korint 9,7: »Ein og hvør gevi, eins og hann hevur sett sær fyri í hjarta sínum, ikki at óhugi ella av neyð; tí at Guð elskar ein glaðan gevara«.

Heimstaðurin hjá børnunum ímeðan tey verða í Føroyum verður á Solo Deo Gloria í Klaksvík, men koma tey eisini at vitja aðra staðni í Føroyum. »Mammurnar« hjá børnunum ímeðan tey verða í Føroyum verða Jabjørt Thomsen og Fríðbjørg Michaelsen úr Klaksvík.

Tað týdningarmesta við vitjanini hjá børnunum úr Ukraina er, at vit geva teimum føðsluríkan mat, eina meiningsfulla frítíð í fráskari luft, so at immunverjan styrkist; men mest av øllum, at tey hoyra evangeliið um Jesus, læra um Jesu kærleika til øll menniskju, og at tey verða elskað av okkum. Vit ynskja, at børnini styrkjast til anda, sál og likam, og at tey skulu fáa nýtt lívsmót, tá tey fara heimaftur til Ukraina.

Tey børn, ið ikki eiga klæðir at ferðast til Norðanlondini í, fáa klæðir frá Skandinavisku Barnamissiónini í Ukraina so tey ikki nýtast at føla seg illa.

Longu nú hevur ein kvinna í Føroyum bílagt og fingið Bíbliur til øll 12 børnini og onnur kvinna hevur bílagt barnabíbliur til børnini, aftur aðrar hava keypt klæði o.a. gott til børnini.

Eisini eru kvinnur byrjaðar at binda til børnini og aðrar sita og binda uppá dukkur, ið eru givnar, hesar verða síðan givnar børnum úr Ukraina.

Prædikarin 11.1. Kasta breyð títt út á vatnið, tí at langa tíð eftir skalt tú finna tað.

### Pakkar til børnini, familjuna o. o. í Ukraina

Kvinnur eru byrjaðar at pakka klæðir o.a. til Ukraina, ætlanin er eisini sum undanfarin ár at børnini sum koma í summar skuu fáa pakkar við klæðum o.ø. Vit í Skandinavisku Barnamissiónini eru ógvuliga takksom fyri alt sum givið verður og kunnu vit vísa á nakað av tørvinum sum dukkur, bilar, rulluskoytur og aðra leiku ið ikki verður brúkt meira, eisini eru klæðir, stearinljós, tógv at binda til tey neyðstøddu, skógvar, teppir, seingjarklæðir og annað hjartaliga vælkomið.

Um fólk vilja ofta tíð til bøn fyri børnunum og arbeiðinum takka vit hjartaliga. Sálm. 127.1 Um Harrin ikki húsið byggir, tá til einkis smiðirnir starva; um Harrin ikki staðin varðar, tá til einkis vaktarin vakir.

Í Ukraina hevur missiónin eina stóra goymslu. 15 støð eru, har ið fólkið í Ukraina kann koma at fáa sær klæðir, støðini líkjast handlum, og starvsfólkið hevur ógvuliga góðan ordan bæði á klæðunum og á




hvørjum tí einasta klædnaplagginum og væl verður fylgt við hvør fær hvat, alt verður skrásett so eingin kann misnýta arbeiði.

Eisini verður farið út til menniskju við ymiskum neyðturviligum, og verða sjúkrahús, barnaheim onnur heim har fólk kunnu koma at hvíla seg og fáa hita, eisini hjálpt, hjálp verður eisini givin, har børn, ið hava foreldur, sum hava drukkið ov nógv rúsdrekka, kunnu koma. Fongsul verða vitjað og evangeliið verður boða.

Samarbeitt verður við onnur ið geva klæðir o.a. út, og gevur (SBM) missiónin til hesi eisini.

Úr Føroyum er ígjøgnum árini givið bæði frá sjúkrahúsinum, ellisheimum, heilsølum, fyritøkum, handlum, peningastovnum og eisini ógvuliga nógv frá privatfólki. Skandinaviska Barnamissiónin vil hjartaliga takka øllum føroyingum fyri hjálpina, ið er givin hesi árini og fyri bønirnar, ið bidnar eru, tað er umráðandi at vit við Guðs hjál pstanda saman um at hjálpa umheiminum og hvørjum øðrum; vit hava brúk hvør fyri øðrum. Jusa, 2: miskunn og friður og kærleiki verið tykkum fyri í rikiligum muni!

### 2. korint 9,12-13

12) Tí at starvi við hesi tænastu bøtir ikki bert um trotið hjá hinum heilagu, men ber eisini ríkan ávøkst við takkargerðum til Guðs frá mongum.

13) Við tað at tey av tí sannroynda hjartalagi, **sum henda hjálpin sýnir,** koma at lova Guði fyri lýdni tykkara til at viðkenna tykkum gleðiboðskapin um Krist, og fyri trúlyndi tykkara í samfelagnum við tey og við øll.

### Tjernobylvanlukkan

Náttina ímillum 25. og 26. apríl 1986 hendi helst hin mest umfatandi atom-reaktorvanlukka higartil. Vanlukkan hendi á Tjernobylverkinum í tí táverandi Sovjetsamveldinum (nú Ukraina).

Sjálvt um fólk bleiv flutt burtur og ymiskt annað bleiv gjørt hevði stórur partur av fólkinum longu upptikið stórar nøgdir av geislavirkna evninum í likamið. Hesi evnini gera tey ikki beinleiðis sjúk beinanvegin, men tey kunnu fáa kyknubroytingar seinni í lívinum. Eisini kunnu evnini førast víðari frá móður til barn.

Ein stórur partur av burturflutta fólkinum eru heimaftur komin. Ukraina er illa fyri fíggjarliga so tað hevur ikki verið møguligt at hjálpa øllum fólkunum, so nakað av fólkinum valdu at flyta aftur til landsbygdirnar sum tey búðu í áðrenn.

Mong hava ikki mat á borðið hvønn dag, og tað lítla av mati mong av teimum fáa, er í nógvum førum dálkað av geislavirkni. Ein stórur partur av grundvatninum og jørðini er eisini dálkað av geislavirkni.

Geislavirkna evni byggist upp í magasekkinum og strálar so víðari út í kroppin.

Í dag síggja vit fylgjurnar av vanlukkuni í 1986. 5% av teimum nýføddu í dag eru fødd við breki. Heilsumálaráðharrin í Volyn-regiónini, eitt av teimum ringast raktu umráðunum í Ukraina, segði við stjóran í Skandinavisku Barnamissiónini, Bo Wallenberg »Vit standa í eini støðu har vit vita, at ógvuliga nógv fleiri verða sjúk, samstundis sum Ukraina er í ógvuliga stórum peningaligum trupulleikum.

Í dag mangla vit tað mest neyðuga so sum mat og heilivág, so vit kunnu hjálpa sjúklingunum. Hvussu vit skuluera í framtíðini vita vit ikki« síðan segði hann, »eg biði teg Bo og Skandinaviska Barnamissiónin um at gera alt fyri at hjálpa okkara fólki í hesi truplu støðu okkara«.

Granskarar í Ukraina siga at niðanfyri standandi sjúkdómar eru vaksnir ógvuliga nógv síðan Tjernobylvanlukkuna:

Skaðar í sentralnervasysteminum.
Maga og tarmtrupulleikar.
Krabbamein í endatarminum, skjaldkertilinum, lungunum og blóðinum.
Hjartasjúkur.
Húð og blóðsjúkdómar.
Eldast ov skjótt.
Andatrupulleikar.
Alment minkandi immunverja.
Børn føðast manglandi limir o.a., t.v.s. fødd við brekum.

Bo spurdi heilsumálaráðharran hvat tað týdningarmesta var, ið SBM kundi hjálpa við. Tá svaraði hann »Bo hjálp okkara børnum«.

Tað eru prógv fyri, at børn ið hava vandamikla nøgd av geislavirkna evninum í maganum verða hjálpt við at koma uttanlanda í ein mánað og fáa føðsluríkan mat og fríska luft. Á hendan hátt byggir ein immunverjuna upp aftur og geislavirkna evni hvørvur úr magasekkinum.

**Ludmilla Loniuks leiðarin fyri Skandinavisku Barnamissiónini í Ukraina greiðir frá.**

Stjórnin krevur at øll børn, sum koma úr dálkaðum øki, skulu í reinari umhvørvi minst 30 til 60 dagar um árið, men hetta hevur stjórnin ikki ráð til. Bert 10.000 fáa henda møguleika. Tí eru tey sera takksom fyri hjálpina tey fáa, sjálvt um arbeiði at hava børnini kann tykjast hart, vónar hon at vit halda áfram.

Í 6 ár hava børn verið og ferðast í Norðanlondunum. Vit síggja broytingina og gleðina hjá teimum tá ið tey koma heim aftur. Ludmilla greiðir víðari frá, at bæði foreldur og systkin kenna tey, ið eru um børnini við navni. Børnini tosa altíð um tey og um hvat tey hava uppliva.

Tann størsti trupulleikin er at velja út hvørji børn skulu koma. Tað verður gjørt í samráð við heilsustýrið, sjúkrahúsið og læknan, so tey, sum eru ringast fyri vera vald. Tá børnini eru vald, fara vit út at savna foreldrini og siga teimum frá hvat fer at henda og hvussu ein tekur sær av teimum. Tá foreldrini eru sannførd um at tað er gott fyri børnini, skulu tey í holt við pappírsarbeiði (pass v.m.) Fyri at fáa pass skulu 8 ymisk pappír útfyllast, 3 av teimum skulu undirskrivast av sakførara. Tað eru ongir sakførarar á staðnum, so antin mugu tey fáa ein at koma á staðið, ella mugu tey ferðast 60-100 km, og tað er ikki lætt tá ongin peningur er. Bæði foreldrini skulu skriva undir. Tey eiga ofta 12-16 børn, og so mugu bæði fara at skriva undir, tað kann geva stórar trupulleikar. Tað tekur missiónini 3 mðr. at fáa passið í lagi. So skal heilsuskjal fyri hvørt barnið sær fáast til vega, hetta fyri at tryggja at barnið ikki er so sjúkt at tað doyr á ferðini, eisini skal staðfestast um barnið hevur allergi, ella tekur onkran heilivág.

Foreldrini vátta skrivliga at tey góðtaka at SBM hevur ábyrgdina av barninum á ferðini, síðani skal stemplast. Tá alt hetta er komið í rættlag, skulu visum fáast til vega frá teimum Norðurlendsku sendistovunum. Eitt arbeiði sum í summum førum kann vera sera torført og tíðarkrevjandi.

Konto navn og nr. er: Tjernobylrakt børn, SBM, postgiro 77178, Føroya Banki 495.217.2, Føroya Sparikassi 125.433.4, Norðoya Sparikassi 100.388.5, Suðuroyar Sparikassi 100.513.9.

# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
- ✓ privatar lýsingar
- ✓ í mesta lagi 40 orð
- ✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
- ✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
- ✓ frá fyritøkum og virkjum
- ✓ fleiri enn 40 orð
- ✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
- ✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
- ✓ Bill. merktar

## Akfør

**SUZUKI SWIFT**
árg. 87, gráur, hevur bert koyrt 125.000 km. Bilurin er í ógvuliga góðum standi. Hann stendur hjá Bilasøluni Øssur Johannesen. Prísur: 15.000 kr.
Tlf. 321617

**DEKK TIL SØLU**
4 dekk við felgum og skálir til Toyota HiAce árg. 2000, koyrt ca. 50 km
Tlf. 216464

**EYKALUTIR TIL**
Toyota HiAce, árg. 86, 2 viskaraarmar uttan viskaramotor, koblings kápil, bremsikápil, cardanaksil, stutt model, dragiskinnari ovari, varmaapparatmotorur, síðulistar, vinstra dragihurð, rele'ir bíliga til sølu.
Tlf. 423572 ella 289560

**SPORTFELGUR**
við dekkum til Peugeot 306 til sølu. Stødd 165 - 13.
Tlf. 452128

**2 BILAR**
sum eykalutir, Nissan Sunny 1500, til sølu fyri avheintingarprís.
Tlf. 451012

**BAKLYGT**
Vinstra baklygt til Mazd 323 GLX árg. 1989 ynskist til keyps. Hevur tú eina at selja mær?
Tlf. 448097

**BÍLIGA TIL SØLU**
Bakfjaðrabein til Nissan Bluebird T12, bíliga til sølu.
Tlf. 423572 ella 289560

**BILUR TIL SØLU**
Nissan Bluebird, uml. 12 ár. Til sølu fyri 19.000 kr. Píkadekk eru undir og dekk 185/65 R14 á felgum fylgja við.
Tlf. 311484 ella 283404

**BILUR YNSKIST**
til keyps, 7-10 ár, fyri ein sámuligan prís.
Tlf. 317865 ella 282165

**DEILIR TIL OPEL ASCONA**
v/svingarm 50,-. Forlyktir við blinkljós, tveir støddoyvarir til baklúku. Bakpottur til Toyota Corolla, óbrúktur, árg. 86.
Tlf. 423572
ella 210560

**EYKALUTIR**
til Daihatsu Charmant, bíliga til sølu.
Tlf. 213577

**BLUEBIRD 1.8 TURBO**
Ein Nissan Bluebird t. 12 árg. 88, hevur koyrt 146.000 km, hevur 135 HK, autopilot v/m til sølu.
Tlf. 310485 eftir kl. 15

**BILTAKBOYLAR**
í sera góðum standi, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319190

**CITROEN**
Saxo 2.1i árg. 6/96, koyrt 56.000 km til sølu fyri 70.000 kr.
Tlf. 221717

**CITROÉN ZX**
1.9 Diesel, við motorskaða til sølu fyri 25.000. Bilurin er ca. 7 ár, reyður við 4 hurðum.
Tlf. 281590
og eftir kl. 18 310566

**DAIHATSU CHARADE**
Árg.´88, til sølu fyri hagsta boð. Sýnaður 1/2000, í góðum standi.
Tlf. 321570

**DEKK Á FELGUM**
til Ford Fiesta ella Kia. 4 summar ella píkadekk á felgum, í góðum standi, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 316114

**EIN BMW 325i**
í sera góðum standi, við allari útgerð, so sum el-spegl, -sóltak, -rútar og leðursetur v/ varma, til sølu.
Tlf. 210346

**FELGIR TIL SØLU**
15" TSW alu felgir, 5 eggern, passa til allar Frod, Peugeot og nakrar Citroen + Audi 80-100. Prísur 1500 kr.
Tlf. 220744

**FORD ESCORT**
árg.´95, sera vælhildin og í góðum standi. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 313441

**FORD SIERRA**
árg. 84, til sølu fyri kr. 5.000.
Tlf. 332551

**FORLYKTIR**
v/h ynskist til Peugeot 309.
Tlf. 282116

**GER TÍN**
egna camping buss. Peugeot J5 við øllum innbúgvi til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 423572 ella 210560

**GERIÐ KVETTIÐ**
Mazda 323 Hatchback 13 mðr. gamal til sølu. Botnviðgjørdur, eins og nýggjur, sleipikrókur fylgir við. Prísuppskot: 95.000 kr.
Tlf. 332203

**GOLF**
1985 við skaða, verður boðin til sølu.
Tordis Jensen
tlf. 313210 ella 313637

**LASTBILUR TIL SØLU**
Toyota Dyna, hevur kalechu og lygt.
Fóm P/F
Tlf. 316244

**MAZDA 626**
2.0 árg. 87 til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. nr. 421225

**MITSUBISHI COLT**
Ein Mitsubishi Colt, árg 91. 1500 cc í sera góðum standi.
Tlf. 441791

**MITSUBISHI PAJERO**
Árg.´88, stutt model, koyrt 125.000 km. Prísur: 38.000 kr.
Tlf. 310254 ella 210254

**NISSAN SUNNY**
Ein Nisan Sunny diesel, SLX, árg. 90, er í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst. Ring
tlf. 221686 ella 443218
eftir kl. 16

**NISSAN SUNNY 1.6 SGX**
Nýrenueraður, nýsýnaður! Bilurin er í besta standi, sær gott út og er ein dreymur a tkoyra. Ring og hoyr nærri. Prísuppskot: 30.000 kr.
Tlf. 215250

**NÝGGJUR**
bilur verður seldur við stórum avsláttri vegna flyting. Renault Mégane, st.car. 1.6 16V 110 hk. Bilurin er einans 3 mðr. gamal og hevur nógva eykaútgerð.
Tlf. 316181 ella 343414

**OPEL MOTORUR**
Ein motorur til Opel Kadett C frá 1975 ynkist til keyps. (Ein forhjulstrektur kann kanska brúkast).
Tlf. 216409

**SUMMARDEKK**
Fýra nýggj Dunlop summardekk 175/65 x 14 til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 315556 aftaná kl. 19

**TIL SØLU**
Opel Kadett sýst í ´87, bíliga til sølu.
Tlf. 457134

**TOYOTA COROLLA**
árg. 88, 1.6 GTI, til sølu, nýsýnaður, hevur sportfelgur.
Tlf. 447451 ella 448373

**TOYOTA COROLLA 1.3**
árg. 12/88, 1.3 sedan, 15" alufelgir og eyka felgir við píkadekkum til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 217192

**TOYOTA STARLET 1.3**
Bilurin er frá aug. 1995, hevur koyrt 60.000 km, 3 hurðar og er í sera góðum standi, til sølu fyri 69.000 kr.
Tlf. 281590
og eftir kl. 18 310566

**VOLVO 760 GLE**
Árg. ´84, koyrt 140.000 km. Bíliga til sølu.
Tlf. 317785

**VW JETTA**
árg. 5/87, 170.000 km, ein eigari, vælhildin, kr. 25.000,-
Tlf. 317484 ella 217484

**VW TRANSPORTARI**
til sølu fyri 4000 kr. Má rullast í gongd, stempliringar, brennir motorolju, annars bilurin í góðum standi.
Tlf. 423572 ella 210506

**VÆLHILDIN**
vínreyður Honda Civic 1.5 árg. 98. Hevur alla eykaútgerð, frontspoylara, bakspoylara, síðuspoylara, tokulyktir, 16" sportfelgur við 215/40ZRF1 dekkum og heilársdekkum á felgum, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 287088

**TOYOTA COROLLA 1.3**
árg. 88 til sølu.
Tlf. 457150

**VÆLHILDIN**
Power Fab til sølu, sær út sum nýggj.
Tlf. 444352,
Hermund

## Arbeiði

**ALT STOYPIARBEIÐI**
verður gjørt, so sum garðar, havaarbeiði, útgrevstur.
Tlf. 281218
ella 316373

**ARBEIÐI**
18 ára gomul genta søkir arbeiði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 318428

**GENTA SØKIST**
til bóndagarð uttan fyri Randers. Tú skalt hjálpa til í húsinum, passa ross, hava og hundar.
Tlf. +45 86442081
ella 220143

**MÚRARAARBEIÐI**
Alt múraraarbeiði verður gjørt. Óbindandi tilboð verða givin.
Múraravirkið Líðin
Mobil 220583
ella heima 421073

**TIMBURMAÐUR**
Søkt verður eftir einum timburmanni beinanveg.
Norðsetur Hús
Hvalvík
Tlf. 422277
fartlf. 286491

**VIT GERA**
hitaverk - sanitet - vatnleiðingar - frágrenningar - takrennur.
T-rør
tlf. 221241 ella 319782

## Barnaútgerð

**BABYSITTARI**
Nýggjur babysittari, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 219994

**BABYLIFT**
Blá vælviðfarin babylift við motivum á, bert brúkt til eitt barn, til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 319460,
Ann-Mari

**BARNAVOGNUR**
Ein sera væl viðfarin myrkabláur Silver Cross barnavognur til sølu.
Tlf. 457735
ella 456480

**BILSTÓLUR**
Góður bilstólur 0-6 mðr, trygdar góðkendur, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 219994

**BRÚKTIR BJARGINGARVESTAR**
Vit sóknast eftir góðum, brúktum bjargingarvestum til børn, støddir 5-12 ár. Vinarliga ring
tlf. 421592, 421137
ella 421424

**EIN**
nýggjur barnakoyristólur til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 442151

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur eina bíliga tremmusong við madrassu at selja mær.
Tlf. 315041

## Barnaansing

**BARNAANSING**
Søkt verður eftir gentu/konu at passa 1 og 6 ára gomlum dreingjum.
Tlf. 316563

**ER TAÐ NAKAR**
ið kann ansa eftir Rebekku og Regin arðru hvørja viku? (2 1/2 ár og 1 ár)
Tlf. 424070

**GENTA/KONA**
søkist at ansa eftir 3 børnum 2, 3 og 6 ár, í Kollafjarða kommunum, skjótast gjørligt.
Ring 421618

## Bátaútgerð

**20 TONSARI**
fiskiloyvi 4A, til sølu.
tlf. 455522

**BAKKI**
og bb. síða úr glasfipur, av 20 tons útróðrarbáti, 3 alu. kassar L 136 H 100 B 60 cm., bíliga til sølu.
Tlf. 216697

**BÁTUR**
við skaða til sølu.
Ring 211544

**BÁTUR TIL SØLU**
Seksæringur hevur ongan motor, selist heilt bíliga.
Tlf. 441950

**BMW-BÁTAMOTORUR**
165 HK, eitt gear 1-2 og ein skrúða. Bíliga til sølu.
Tlf. 373997

**ELEKTRISKAR SNELLUR**
Tann elektriska Vágasnellan er aftur á goymslu. Bíleggingar, brochurur ella spurningar.
Ring tlf. 212422

**NEYSTAGRUND**
á Strond í Klaksvík til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 319932 best eftir kl. 17

**TIL SØLU**
Aramis BcF 30 fót. Líti brúktur, alla nautiska útgerð, 5 el-snellur. Kanska minni bátur kann býtast.
Tlf. 373989

## Bingo

**BÁRUTOMBOLA**
Stórt páskareggs-tombola verður leygardagin 25. mars frá kl. 9.30-13.00 og frá kl. 18.30-22.30 á Statoilstøðini. Ein ørgrynna av páskareggum, ja uml. 5-600 páskaregg.
Bygdarfelagið Báran

**BASARUR**
Basarurin sum lýstur varð at vera 1. apríl, verður ístaðin leygardagin 6. mai í samkomuhúsinum í Sumba.
Sumbiar Ítróttarfelag

**BINGO Í PÁLLSTOVU**
verður sunnudagin 26. mars kl. 16. Gávukort á 500 kr. til fulla plátu, á lutaseðli m.a. 3 gávukort á 1.000 kr. og 1 á 3000 kr. Eykaspæl verður og koyring heim.
Pállstova

**EYDNUHJÓL**
til frama fyri Skálan verður leygardagin 15. apríl kl. 19.
Klaksvíkar Dansifelag

## Lýsingartekstur

______________________________

Lýsingin ynskist: [1] [2] [3] [4] [5] ferðir *(set X)*
undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Leikur | ❑ Lutaseðlar |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út- & sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ……………… |

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: ……………………………………………

Bústaður: ………………………………………

Bygd/býur: ……………………………………

Tlf.: ……………

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki